# Vár við nýggjum vindi

**Aldubáran fer aftur á pall ella gólv í Listaskálanum leygardagin. Ikki færri enn fýra frumframførslur eru á skránni til konsertina**

VÁRTÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Síðani tónleikabólkurin »Aldubáran« varð stovnaður fyri 10 árum síðani hava tey glett mangar áhoyrarar við tónleiki sínum.

Leygarkvøldið verður enn eitt høvi at hoyra bólkin spæla nýggj tónaverk eftir føroyskar komponistar.

Tey fara hetta kvøldið at spæla nýggj verk eftir Kára Bæk, Atla Petersen, Kristian Blak, Tróndi Bogason og A. Skrjabin.

Talan verður um eina heldur øðrvísi konsert enn vanligt, tí ætlanin er ikki at spælararnir bara skulu standa á einum staði alt kvøldið.

Henda konsertin hjá Aldubáruni verður hildin í samband við at Várframsýningin hjá Listasavni Føroya letur upp í morgin.

Hetta kvøldið verður tí gott høvi at fara á konsert, samstundis sum ein kann fara á Várframsýning.

## Filmur og tónleikur

Aldubáran hevur havt skiftandi manningar gjøgnum árini, og hava tey luttikið við mong ymisk høvi.

Tey eru somuleiðis við á nýggju fløguni, sum kom út í gjár við verkum eftir Kára Bæk. Og tey fara eisini at spæla verk úr hesi nýggju fløguni á konsertini leygarkvøldið.

Ein serstakur partur verður settur av til filmstónleik. Marianna Mørkøre, sum saman við eini aðrari kvinnu, hevði eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík herfyri við videoinstallasjónum, hevur nevniliga gjørt ein film til eitt lag eftir Atla Petersen.

Hetta lagið, ið kallast »Summi siga« varð skrivað serstakliga til Andras Olsen í 1988, og verður tað at hoyra nú leygarkvøldið. Í samband við lagið hevur Marianna verið í Týskalandi og tikið upp ein film, sum eisini verður at síggja undir konsertini.

Vanligt er, at ein bólkur hevur eitt fast pláss undir eini konsert, men leygarkvøldið er ætlanin at flyta pallin runt í Listaskálanum. Hetta verður serliga gjørt tá soloverkini eru á skránni, og fáa áhoyrararnir soleiðis høvið til at hoyra onkur verk spæld í øðrum rúmum, har aukustikkurin somuleiðis er sera góður.

Við í Aldubáruni hesaferð eru bæði føroyingar og ein dani: Anna E. Klett á klarinett, Andras Olsen á trombon og danin Thomas P. Gooseman á klaver.



*Tey eru klár til konsertina leygarkvøldið. Í Aldubáruni hesaferð eru Anna Klett, Thomas Gooseman og Andras Olsen,*
*Mynd: Jens Kr. Vang*




UNGDÓMSSTEVNAN 2005
**HVAT ER LÍVIÐ?**
3. - 6. mars í Ebenezer

Ungdómsstevnan 2005 undir heitinum 'Hvat er lívið?' verður í Ebenezer frá hóskvøldi 3. mars til sunnukvøldið 6. mars.

**Hóskvøldið 3. mars kl. 20.00**
tosar Róland í Skorini um evnið 'Lívið í trongdum og gleði'.

**Fríggjakvøldið 4. mars kl. 21.00**
tosar Gunnar Nielsen um evnið 'Lívið sambært Guds standardi'.

**Leygarkvøldið 5. mars kl. 21.00**
tosar Símun í Túni um evnið 'Avgerðir fyri lívið'.

**Sunnudagin 6. mars kl. 17.00**
tosar Tom Roberts um evnið 'Vel lívið'.

Ung úr Klaksvík, Eysturoynni og Havn luttaka við sangi, tónleiki og leiki. Ungdómskórið í Ebenezer luttekur. Hoyr fleiri ung vitna um Jesus sum umbroytti lív teirra.

Eftir møtini er drekkamunnur og samvera.

EBENEZER

Ebenezer, N. Finsensgøta 6, FO-100 Tórshavn

www.sansir.fo



J. Broncks gøta 37 · Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

**PÁSKATILBOÐ**
UPPLIVINGAR · STUTTLEIKI · MØGULEIKAR · HUGNI · FAMILJUSAMVERA

Tilboðini eru galdandi í tíðarskeiðnum 17. mars – 19. mai 2005



Danland hevur alt sum krevst til at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman. Pakkið bilin, koyrið umborð, njótið undirhald, mat og tiltøk umborð og koyrið síðan úthvíld í land og beinleiðis til frítíðardepilin!

**Sera lætt og til henda prísin, næstan ov gott til at vera satt!**

Danland

**1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**úr 7.395,-**

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland íbúð í 1 viku í Hirtshals, Ebeltoft, Blokhus ella Skagen Strand.

*Av øðrum góðum tilboðum kunnu nevnast:*

**SKALLERUP KLIT**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 7.995,-**

**SUMMARHÚSFERÐ**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 6.590,-**

**RØNBJERG FERIEC.**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 10.160,-**

**VIGSØ FERIECENTER**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 8.995,-**

**Íroknað omanfyri nevndu tilboðum er:**
Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innan. Uppihald í 1 viku á nevndu gistingarstøðum. Við í prísinum er eisini reingerð við fráferð.



**Fjølbroytt undirhald verður á páskatúrunum 17/3 og 24/3** við millum øðrum Hannibal og ..., ja, gita hvørjum.

SMYRIL LINE

**Droym tað ikki – royn tað!**